*Framhald av síðu 15*

Hans Jákup, Martin Joensen og aðrir hava sitid og skift orð um, hvussu destruktivan, vandamiklan og lemjandi negativan, teir hildu allan tjóðveldis- og fólkaflokkspolitikk vera.

*Aldri kundu Heðin Brú ella vinmenn hansara verið nationalistar!* Teir vóru fyrst og fremst *skeptikarar* og lótu seg ongantíð taka av fótum, enn minni imponera av rakstrarrópum; teir vóru nevniliga logiskt og rationelt hugsandi menn, - tey *chauvinistisku* ýlini fingu teir bara at yppa øksl; teir vanvirdu alt tað irrationella, - serliga fullveldisreypið!!

## Lívsfrælsi og virðing fyri Danmark

Teir høvdu harafturímóti stóra virðing fyri, hvussu tað modernaða Danmark hevði gingið føroyingum á møti, teir fegnaðust um heimastýrislógina, og teir ynsktu av fullum hjarta ríkisfelagsskap við danir. Teir vistu, hvar størsti vandin var fyri okkara fólk, bæði fíggjarliga og kulturelt! Teir ræddust harðrenda anglosaksiska ágangin á okkara mál og mentan, og teir vistu væl, at bara *symbiosan* við danir, sum frá leið, kundi bjarga okkum sum tjóð. Teir vóru skelkaðir um, hvussu tað var gingið Hetlandi og Orknoyggjum. Teir vóru eisini illa við av, hvussu illa okkara mál fór av lagi bara tey fimm kríggsárini, tá ið slitið var vid Danmark, og vit vóru undir enskari ávirkan.

Kongstanki teirra var, at í *Føroyum skuldu føroyingar liva*, og tað kundi best røkkast við *lívsfrælsi, pragmatisku ideologiini* hjá Peturi Mohri Dam. Eingin loysingar-maður var nakrantíð førur fyri at standa seg í debatt við teir um ríkisfelagsskapin, sum teir hildu veita okkum mesta lívsfrælsi og kulturella lívd. Alt annað sonevnt frælsi var eftir teirra tykki bert innantómt reyp, knappholserpni ella *armóðsfrælsi*, og ta sóttina kendu teir í ólukkumát frá barnsbeini, - bæði Heðin Brú og hinir — tað var sanniliga einki at tráa eftir!

Táið talan í 50unum fall á fólkaatkvøðuna plagdu teir at rysta vid høvdinum og hildu spotskliga fyri, at um ikki allir teir innbilsku, nýliga heimvendu asfaltsmenninir og teirra donsku konur høvdu sloppið at atkvøtt á fólkaatkvøðuni, men bara heimafólkið, so hevði verið stórur meiriluti fyri sambandi. Tí mettu teir fólkaatkvøðuna moralskt uttan innihald, hon var úrslitið av hetz, manipulatión, øsing og kríggspsykosu. Tað rann jú eisini politiskt skjótt av aftur hjá fólki, táið tey fingu fótað sær.

## Danskt mál og skaldskapur

Men eingin skal halda, at Hans Jákup og javnaldrar einans tosaðu um politikk, nei - teir fylgdu væl við og skiftu orð um alskyns fyribrigdi, ikki minst um skaldskap, serliga hugtiknir vóru teir av donskum skaldskapi. Hans Jákup las ofta upp brot av danska skaldinum og vinmanninum, Martin A. Hansen, men eisini arbeidaraskaldið Oskar Hansen, Tom Kristensen, Brandes, Johannes V. og Pontoppidan høvdu teirra stóra áhuga.

Teir kendu seg heima í skaldskapinum hjá hesum monnum. Umframt hesar varð Janus Djurhuus ofta upplisin, kommenteraður og stórliga fagnadur. Hetta má við fyri, at menn kunnu fata, hvaðani Hedin Brú fekk inspiratión. Hann segði ofta, at hann beinleiðis seyg úr danskari mentan og donskum skaldskapi, sum hevði havt ómetaligan týdning fyri hann — hetta loypa nationalistarnir oftast um.

Endiliga røddu Hans Jákup og vinmenn ofta um, hvussu takksamir vit skuldu vera um at duga danskt mál, sum teir hildu vera universallykilin til hini norðurlendsku málini.

Tá ið onkur nationalistur royndi at andøva ímóti donskum, søgdu teir altíd: ”Jamen vælsignadur, tað er ikki úr landsuðuri, at nakar málsligur vandi kemur i dag, nei hann kemur úr Hollywood og frá eingilsku kulturimperialismuni gjøgnum poppídnaðin.”

## Veitslurøðari

Men tað er nógv annað, sum vert kundi verið at trivið í, eitt nú evni hansara sum veitslurøðari.

Við rundar føðingardagar, silvurbrúdleyp og onnur veitsluhøvi hava vit ótrúlig minni um hann sum meistarligan røðara. Hann var á sín stillføra hátt sjáldsama stuttligur — t.d.var hann virtuosur í tí, sum danir kalla ”underdrivelser”. Tað var beinleidis løtuskaldskapur, - viðhvørt vóru hugarenslini vælfyrireikað, viðhvørt hegnisliga improviserað. Men lágmæltur var hann, so vit, børnini plagdu altíð at kappast fyri at at vera so nær røðaranum sum møguligt fyri, at ikki ov nógv røðutilfar skuldi fara fyri skeyti. Tey, sum sótu vid háborð, fingu sjálvandi mest við.

Silvurbrúdleyps-røður hansara fyri vinfólki vóru legendariskar, men serliga minnast vit 50-ára dagin hjá pápa mínum, har Hans Jákup helt eina gudbenáðaða røðu um óvitaaárini hjá teimum í Skálavík. Sjálvandi hoyrir hetta avgjørt privatsfæruni til, og tí skal eg ikki citera; men tað var soleiðis, at leingi eftir var í familjuni javnliga tikið til orðalagið í hesi røðu, - hvussu skemtilig og vælkomponerað, hon var.

Og sum so ofta, táið slíkar samkomur vóru, varð farið uppá gólv og *Grái táttur* kvøðin. Og sjálvt um Heðin Brú ikki skipaði sjálvur, kundi hann altíð sufflera, og hann stuttleikaði sær óført, meðan hann brosandi livdi við i teimum grotesku fullveldisrembingunum hjá fundamentalistunum í tretivunum.. Hesi kvøld vóru skemtikvøld. Men tey vóru eisini mentakvøld! Hesir menn vóru vertskapsmenn í sama anda sum sambandsskaldið, Rasmus Effersøe. Teir dugdu at vera saman í gaman og álvara, og sjálvt um teir vóru so rótføroyskir sum nakar, fall aldri eitt einasta ilt ella øvugt orð móti Danmark ella dønum.

## Politisk niðurstøða

Er nøkur einføld konklusión? Ja, tað er heilt eyðsæð, at lívið og tilveran hjá Hansi Jákupi var munandi øðrvísi og fjøllbroyttari enn tað, vit hoyra frá *Kulturmonopolinum*. Hans Jákup hevði við síðuna av sínum skaldskapi eitt ríkt samfelagslív. Hví skal hetta liggja á láni? Hví skal persónlýsingin halta? Hví er tað so umráðandi fyri opinións-skaparar í dag at geva eina falska mynd av skaldinum? Hví mugu ungfólk í dag ikki fáa at vita, at hann var í sterkari andstøðu til alt tað, sum chauvinistarnar vildu og framvegis vilja?

Man tað ikki vera tí, at vandi er fyri, at fólk fara at spyrja HVÌ, og at tey kanska fara at varnast analogiina til viðurskiftini í dag? Man tað ikki eisini vera umráðandi at krógva og fortreingja søguna um tað gamla stættarsamfelagið, sum Jóannes Patursson helt so nógv av, romantiseraði og beinleiðis hálovaði? Tað tykist sum um søgumenn og fjølmiðlafólk beint út forða yngri fólki í at náa fram til hetta erkennilsi!

Hví gjørdist Heðin Brú javnaðarmaður? Tí honum dámdi ikki stættarsamfelagið hjá Jóannesi bónda. Hann vildi sleppa av við tað samfelagið ; hann vildi hava eitt socialdemokratiskt og rættvísari samfelag.

Hvat søgdu loysingarmenn: *Fyrst* loysing, og *síðani* kundu vit helst seinni einaferð fara og hyggja at og kanska justera okkurt av tí sociala órættvísinum.

KORTANEI søgdu Hans Jákup, Petur Mohr Dam og nógvir við teimum, tí teir vistu, at so bleiv tað ALDRI! Slíkt var fyri hesar menn hvørvisjónir, uttanumtos og møsn. Eingin fer til sjós, uttan útgerð. Ùtgerðin má vera tøk, áðrenn siglt verður! Her vóru Hans Jákup og hansara menn kompromisleysir. Tað skuldu eingi **eksperiment** vera við vælferðini hjá fólki. Tað er kyniskt, og tað er ábyrgdarleyst! Teir vistu, hvør kom at gjalda fyri ørskapin. Teir vistu, hvørji máttu rýma av landi. Teir vildu ikki góðkenna, at nakar hevdi rætt til at eksperimentera við einum samfelagi, har tað ikki var pláss fyri øllum. (*Plads for dem alle, plads for alle, der vil* - kvað danska javnaðarskaldið Oskar Hansen um hvør, ið átti at verða boðin til *samfundets bord*!)

Teir vildu als ikki góðkenna, at ríkisfelagsskapurin við Danmark kúgaði okkum — tvørturímóti, teir hildu, Danmark geva okkum ein skáa. Teir nevndu tad brotsgerð, um nakar landsmaður ikki slapp at vera føroyingur av fíggjarligum grundum.

## Málslig niðurstøða

Men táið vit so hava erkent, at hann var ein rættvísissál, sum eins og P. M. Dam fyrst og fremst hevði umsorgan og *empati* fyri tí fátæku fjøldini, so skal tað avgjørt legggjast afturat, at hann kundi geva sínum hugsjónum lív á so góðum fyndarmáli, at vit øll eiga at vera honum takksom, og hann maktaði hartil eisini tað, sum fleiri aðrir høvdu roynt, men til fánýtis: At skriva óbundnan skaldskap, so tað ikki var sum betong at fáast við. Hann skrivaði lesiligt, léttliga og elegant. Tað var ongantíð ein fyritøka at fara undir hansara prosa.

Her eru vit við aðalmálið. Hans Jákup í Stovuni hevði eina sjáldsama gávu, - hon eitur TALENT. Og tí gávuni hevur Várharra altíð rationerað nógv við, eisini í Føroyum. Henda gávan hevur í *serligan mun* skortað á føroyska parnassinum, og ger tað kanska allarmest í dag.

Summir vilja í dag taka málið frá fólki og patentera eitt ávíst konstruerað mál úr erva. Hesir menn eru totaliterir, og hava lítla fatan av, hvat mál er, og hvar tað verður skapt. Hans Jákup visti, at vanligi maðurin hevði aloftast betri málburð enn teir, ið pretentiøst nevna seg rithøvundar ella málmenn. Tað er í gerandislívi, at tað málsliga støðið verdur lagt, og tað var hendan málbotnin, málmeistarin Heðin Brú bygdi á. Hevði hann livað í dag og sæð málfundamentalismuna, hevði hann agiterað fyri, at málið aftur varð demokratiserað, **tikið frá fanatikarunum** og latið fólkinum í hendi.

***Aðaltátturin er tann, at júst tí, at Heðin Brú og hinir vóru tjóðskaparliga sinnaðir, so vistu teir, betri enn tey flestu, at skuldi okkara lítla máli vera lívi lagað, máttu vit hava danskan skáa.***

***Tað stóra paradoksið, sum summi ikki hava skilt enn, er, at tann mest frælsa og tjóðskaparliga støða er lívsfrælsið og kulturverjan innan fyri danska ríkisfelagsskapin.***






# Atlantsflog byrjar nýggja rutu



Atlantsflog fer komandi summar at stovna nýggja flogrutu millum Vágar og Oslo, sigur Kent Christensen, marknaðarleiðari hjá Atlantsflogi

Mynd: Edvard Joensen

**Komandi summar fer Atlantsflog at flúgva tvær ferðir um vikuna til Oslo. Túrarnir verða somu dagar, sum flogið verður til Stavanger**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*



**Ilulissat:** Atlantsflog fer at flúgva til Oslo komandi summar. Nýggja rutan verður í fyrsta umfarið flogin í tíðarskeiðnum 18. juni til 19. august.

Ferðirnar til Oslo verða lagdir í samband við túrarnar, sum longu eru til Stavanger. Flogið verður til Noregs mikudag og leygardag.

Mikudag verður flogið úr Føroyum til Stavanger. Haðani til Oslo, og so beinleiðis aftur til Føroya.

Sunnudag verðut túrurin tikin øvugtan veg. Farið verður úr Vágum til Oslo. Á heimleiðini, verður so millumlent í Stavanger, greiðir Kent Christensen, marknaðarleiðari hjá Atlantsflogi, frá.

## Við á ferðamessu

Atlantsflog er umboðað á ferðamessuni Vestnorden Travel Mart, sum seinastu dagarnar hevur veirð hildin í Ilulissat í Grønlandi. Her hevur Atlantsflog lagt fram nýggju ferðaætlanina fyri komandi ár.

Kent Christensen sigur, at ætlanin við at flúgva til Oslo er gjørd eftir somu grundgeving, sum tá farið varð at flúgva til London í summar. Roknað verður við, at Oslorutan meira er ein turistruta, enn Stavangerrutan er.

Mett verður, at ferðfólkini úr Stavanger í størri mun eru fólk, sum koma at ferðast í vinnuligum ørindum. So tann rutan verður verðandi, hóast ein ruta kemur afturat til Oslo.

Um ferðaætlanina fyri komandi ár sigur Kent Christensen annars, at eisini á Bretlandsrutunum verður onkur smávegis broyting, sum fer at líkjast Noregsrutuni.

Flogið verður til London Stansted sunnukvøld og hóskvøld. Og báðar ferðirnar verður Aberdeen við í rutuni.

Sunnukvøld verður flogið úr Vágum til London, har flogfarið stendur um náttina. Mánamorgun verður millumlent í Aberdeen á veg aftur til Føroya.

Hóskvøld er tað øvugt. Tá verður flogið til Aberdeen á veg til London, og so beinleiðis heim aftur úr Stansted fríggjamorgun, sigur Kent Christensen.

Til Keypmannahavnar fer Atlantsflog at flúgva 16 ferðir um vikuna komandi ár, meðan ferðirnar til Billund verða tríggjar ferðir um vikuna.

Eisini Reykjavík fer at standa á ferðaseðlinum hjá Atlantsflogi komandi ár, sigur Kent Christensen. Hagar verður flogið tvær ferðir um vikuna, sigur hann.

## Nøgdir luttakarar

Føroysku luttakararnir á Vestnorden Travel Mart eru sum heild nøgdir við messuna í ár.

Teir siga, at tað eru komnir nógvir fyrispurningar um, hvat føroyingar kunnu bjóða ferðafólki. Og onkur metir, at tað ivaleyst fer at spyrjast okkurt skilagott burturúr.

Fatanin er, siga føroysku luttakararnir, at fólk eru fyrireikað og meina tað seriøst, tá tey koma at tosa um ferðing í Føroyum.

Eisini koma nýggj og spennandi hugskot. Eitt nú um at fáa føroyskar bussar at koyra uttanlands við fremmandum ferðafólki, sum leggja leiðina um Føroyar og so fáa buss við sær til dømis til Íslands og aftur til Føroya.

Aðrir luttakarar siga frá fólki, sum er áhugað í at fáa serligar ferðir í Føroyum. Ferðir, sum kosta pengar, og sum tey eru sinnað at gjalda tað fyri, sum tað nú kostar.

Tað er eitt sindur ymiskt, skilst á luttakarunum, hvør tað er, sum kemur at heilsa uppá. Nógv eru gamlir kenningar, sum ganga aftur. Men tað koma eisini heilt nýggir keyparar, sum ikki hava verið í Føroyum fyrr. Og tað er positivt, siga tey.

Tað verða annars vanliga ikki gjørdar nakrar ítøkiligar avtalur á slíkum messum. Tað er meira fyri at stovna sambandið við møguligan komandi kunda og sleppa at siga frá tí, sum fyritøkan og landið sum heild hevur at bjóða.

Ferðamessan í Ilulissat í ár er annars skipað heldur øðrvísi, enn tær hava verið árini frammanundan. Tá hava tær verið sum rættiligar messur við básum og standum, har hvør hevur sýnt sítt fram. Í ár hava fyrireikararnir valt at gera messuna um til sonevndar »workshops«, har fók sita yvir av hvørjum øðrum við eitt borð og tosa saman.

Tað hevur virkað væl, siga bæði vertir og gestir. Og serliga hava tey, sum ferðast hava langvegis, merkt, at tað verður bíligari í ferðakostnaði, tí einki er at flyta aftur í móti tí sum er, tá ein heilur básur skal setast upp.

